gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Sparifrymilin skal burtur

*- Politikararnir ynskja ein skúla á pappírinum, sum hevur góðar endamálsorðingar og ætlanir, men tá ið tað kemur til tann peningaliga partin skákar løgtingið sær undan, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag*



**- Vit hava boðað Mentamálastýrinum frá, hvørjar ætlanir vit hava viðvíkjandi tímabýtinum, og haðani hava vit fingið at vita, at tey eisini eru áhugað í, at skipanin verður broytt, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Sparifrymilin, sum varð settur í verk í fólkaskúlanum í ringastu kreppuárunum fyrst í nítiárunum, setur framvegis dagskránna innan skúlagátt. Men stendur tað til Føroya Lærarafelag skal hesin takast av. Felagið fer í næstum undir at fáa skipanina broytta soleiðis, at hvør skúli ger upp hvønn tímatørv tey hava og søkir hareftir. Ikki sum nú, har skúlarnir fáa eitt tímatal og út frá tí royna at fáa kabalina at ganga upp.

- Vit hava boðað Mentamálastýrinum frá, hvørjar ætlanir vit hava, og haðani hava vit fingið at vita, at tey eisini eru áhugað í, at skipanin verður broytt, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

At tímabýtið framvegis verður ásett eftir einum sparifrymli, er sera óhøgligt fyri skúlarnar. Serliga teir miðalstóru skúlarnar eru við skerdan lut.

- Tað eigur at vera øvugta mannagongdin, har skúlarnir fáa tímarnar teir hava brúk fyri. Í almannaverkinum eru nógvar uppgávur lógarkravdar og játtanin ásett hareftir. Á sama hátt eigur skúlaverkið at verða skipað. Sum er fær alt skúlaverkið eina játtan, sum alt skal kroystar niður í, uttan mun til um rúm er fyri tí ella ikki.

## Ábøtur neyðugar

Umframt arbeiðir Lærarafelagið við at broyta skipanina soleiðis, at tímarnir ikki verða býttir út á næmingarnar, men heldur flokkarnar.

- Í Føroyum ber ógvuliga illa til at býta tímar eftir næmingunum. Nógvir smærri skúlar eru og á teim flestu ber sera illa til at fylla ein flokk við 24 næmingum. Hetta ber bara til á teim heilt stóru skúlunum. Frymilin, sum kom í kreppuárunum, er ongantíð dagførdur ella endurskoðaður, hóast skúlaleiðarar hava víst á ymiskar skeivleikar og møguligar ábøtur, sum eiga at verða gjørdar. Tað er eyðsæð, at tá ið vit hava so ymiskar skúlar í landinum, hvat viðvíkir støðd, næmingatali, flokkatali og so framvegis, er tað sera truplult at finna eina skipan, sum kann taka atlit fyri øllum undir einum.

Føroya Lærarafelag hevur sett fólk av til uppgávuna at endavenda skipanina við tímabýtinum, og miðar eftir at verða liðugt við uppgávuna, áðrenn fíggjarlógin fyri komandi ár verður løgd.

- Tá ið kanningararbeiðið frá okkara hond er liðugt, leggja vit tað fyri politisku skipanina. Vit hava góðar vónir um, at hetta vinnur frama, tí politikararnir eiga at verða áhugaðir í, at skipanin er góð. Tað ber í øllum førum ikki til at halda fram at býta tímarnar út eftir verandi frymli, sigur Elsa Birgitta Petersen.

## Allir flokkar ábyrgdina

Skiftandi landsstýrismenn í mentamálum hava í fjølmiðlunum borið fram, at játtanin til fólkaskúlan er økt seinnu árini, eisini undanfarni landsstýrismaður stutt fyri at hann fór frá. Rætt er, at tølini eru størri, men hetta er bara hálvur sannleikin. Krøvini til fólkaskúlan eru økt nógv meiri enn játtanin, KT-tøknin er komin inn um skúlagátt, nýggjar semjur eru gjørdar um arbeiðs- og lønarviðurskiftini hjá lærarum, umframt annað sum alt kostar pengar og sum alt eru samtykt av løgtinginum, tó uttan at neyðugi peningurin fylgir við. Tískil er játtanin til fólkaskúlan minkað, sjálvt um tølini eru størri, sum ført verður fram í seinasta skúlablaðnum.

Nýggi landsstýrismaðurin í mentamálum, Óli Horn, ætlar til komandi fíggjarlóg at stremba eftir at fáa hægri játtan til fólkaskúlan.

- Vit vóna eisini, at tað eydnast honum, tí niðurpíningin av fólkaskúlanum kann ikki halda fram. Men eitt er, hvat landsstýrismaðurin vil. Annað er, hvat Fíggjarmálastýrið, sum er stýrið yvir øllum stýrum, gongur við til.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag sigur, at eingin flokkur á Føroya Løgtingi kann skáka sær undan ábyrgdini av at støðan í føroyska fólkaskúlanum er so vánalig.

- Politikararnir ynskja ein skúla á pappírinum, sum hevur góðar endamálsorðingar og ætlanir, men tá ið tað kemur til tann peningaliga partin skákar løgtingið sær undan. Meðan nýggja lógin varð í gerð, løgdu vit útrokningar fram, sum søgdu hvussu nógv hon fór at kosta at seta í verk, umleið 88 mió. krónur. Politikararnir lurtaðu ikki eftir okkum, men bara eftir embætismonnunum, sum søgdu nakað heilt annað. Bara einstakir politikarar vóru greiðir yvir, at fólkaskúlalógin fór at kosta meir, sigur Elsa Birgitta Petersen.

# Olaus nýggjur deildarstjóri

**Mentamálastýrið setti í gjár Olaus Jespersen í starv sum deildarstjóri fyri fólkaskúladeildina í Mentamálastýrinum**

STARVSSETAN
*Turið Kjølbro*



*Olaus Jespersen, nýggjur deildarstjóri í Fólkaskúladeildini í Mentamálastýrinum. Mynd: Jens Kristian Vang*

Nýggi deildarstjórin fyri fólkaskúladeildina í Mentamálastýrinum fær ábyrgdina av at fyrisita hægru umsitingina av fólkaskúlanum og øðrum skúlum og stovnum. Á økinum eru millum annað hesir skúlar og stovnar: fólkaskúlarnir, sum eru umleið 60 í tali, Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð, Musikkskúlar, Sernámsfrøðiligt virksemi, Føroya Skúlabókagrunnur, Føroya Fólkaháskúli, Húsarhaldskúli Føroya og frítíðarundirvísingin.

Olaus Jespersen er 50 ára gamal, hann tók lærarapróg v á Føroya Lærarskúla í 1975 og harumframt hevur hann eisini tikið skeið innan fyrisiting, samráðingarrætt og leiðslu. Olaus Jespersen hevur verið í starvi sum undirvísingarleiðari í Landsskúlafyrisitingini ella Mentamálastýrinum frá 1986 til 1999. Frá 1999 til í dag hevur Olaus verið í starvi sum fulltrúi í Lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum.

Olaus Jespersen tekur við starvinum sum deildarstjóri fyri fólkaskúladeildina í Mentamálastýrinum so skjótt sum til ber. Hensar Ellingsgaard, sum hevur verið deildarstjóri síðani 1998, fór frá fyri aldur 1. juli.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



Skip, ið kortleggur havbotnin:

# Nógv at gera í Føroyum



*John Garrow heldur, at hansara manning fer fáa nógv arbeiði í Føroyum framyvir*
Mynd: Jens Kr. Vang




**Bretska skipið Kommandor Jack hevur serútgerð at gera botnkanningar. Tað hevur gjørt umhvørviskanningar av botninum við boripallin hjá Statoil, og nú er skipið leigað sum liður í eini heimsumfatandi veðurlagskanning**

SKIP
*Stefan í Skorini*

– Vit hava tosað um Føroyar tey seinastu tíggju árini, og um nær vit fara at arbeiða her, sigur John Garrow, sum er komin til Føroya at samskipa virksemi hjá skipinum.

Kommandor Jack hevur eisini havt fleiri uppgávur í Føroyum seinastu tíðina. Skipið hevur staðið fyri at gera botnkanningar, har ein telekaðal skuldi leggjast millum Føroyar og Ísland, og nú er tað komið til Føroyar at gera veðurmátingar fyri universitetið í Hamburg, sum er liður í eini heimsumfatandi skráseting av veðurlagnum. Hetta skal staðfesta veðurlagsbroytingar.

Ein onnur áhugaverd uppgáva hjá skipinum hevur verið at gera botnkanningar fyri Statoil. Oljufelagið, sum leggur fyri við at bora í Føroyum, bílegði skipið at taka lívfrøðiligar royndir av havbotninum, sum vórðu sendar á eina starvsstovu at kannast.

– Tað er vanligt at oljufeløg gera lívfrøðiligar kanningar av umhvørvinum, áðrenn byrjað verður at bora. Soleiðis kunnu tey staðfesta, um nakrar broytingar eru í djóra- og plantulívi við leitingarøki, tá tey taka somu royndir eitt ár eftir, greiðir John Garrow frá. Á henda hátt verða árin av dálking skrásett.

## Gamalt skip – nýggj útgerð

Skipið er bygt í 1961 og er tí ikki heilt nýtt, men nýggju eigararnir hava nýtímansgjørt tað munandi við umbyggingum og framkomnari tøkni.

– Hetta er eitt gamal skip, sum vit hava nógv bøtt um. Nú hava vit ógvuliga framkomna navigatiónsútgerð umborð, so vit kunnu átaka okkum torførar uppgávur, greiðir John Garrow frá.

– Vit hava GPS-skipan umborð, so vit kunnu liggja á sama punkti sjálvt í ógvuliga ringum sjógvi, og tí er hetta skipið væl egnað til kortlegging av havbotninum.

Kommandor Jack hevur serútgerð at kortleggja havbotnin, og tað er hetta, sum teir fáast mest við. Um oljufeløg skulu leggja rør av einum boripalli til lands, so skal skipið finna ta bestu leiðina eftir botninum.

John ivast í, um talan verður um at leggja rør av boripallum til lands í Føroyum. Hetta verður oftast gjørt, tá talan er um fasta boripallar, men teir flestu boripallarnir nú á døgum eru flótandi.

Men teir átaka sær eisini aðrar uppgávur sum at gera mátingar av sjónum og kanningar av djóralívi á havbotninum. Skipið verður tó mest brúkt av oljufeløgum, ið hava tørv á neyvum botnkanningum, sum Kommandor Jack kann veita við tí stóra ekkoloddinum á kjølinum.

## Væntar nógv virksemi

John Garrow og fyritøkan hann starvast hjá vænta, at Føroyar fer at vera eitt øki, har teir fara at fáa nógvar arbeiðsuppgávur í framtíðini.

Meðan vit práta stevnir Norrøna inneftir vágni, og John sigur, at tað skjótt fer at vera nógv meira trongligt í hesi havnini framyvir. Um olja er í undirgrundini.

– Hetta fer at broyta tykkara gerandisdag í Føroyum, og nógv fremmandafólk kemur til landið. Stórur eftirspurningur verður eftir arbeiðsmegi, og tí kunnu tit vænta, at lønir fara uppeftir.

Hóast eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi í oljuvinnuni fer at økjast, so heldur John tað vera av alstórum týdningi, at fiskivinnan framvegis kann útvega sær arbeiðsfólk, tí tær siðbundnu vinnurnar mugu halda fram eftir sama leisti sum áður.

Í øðrum londum sum í Hetlandi er ein oljugrunnur settur á stovn, tá oljuvinnan tók dik á seg har fyri góðum tjúgu árum síðani. Hesin oljugrunnur veitir íbúgvunum í Hetlandi vegir, svimjihallir og aðrar hentleikar, men stjórnin í London fær sanniliga eisini sín part av oljupengunum.

John Garrow sigur, at føroyingar fyrst skulu fáa oljuna upp úr undirgrundini, áðrann vit fara at tosa um, hvussu pengarnir skulu býtast.




*Kommandor Jack á Havnini, sum hevur serútgerð at gera botnkanningar*
Mynd: Jens Kr. Vang